LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD FIESTA
árg.89 biliga til sølu. Krevur smærri ábøtur.
Tlf. 253039

OPEL CALIBRA 2.0i
árg. 1995, 155 HK, km. 50.000, til sølu fyri 140.000 kr.
Tlf. 216869

FORD ESCORT
st. car, árg. 96 til sølu.
Tlf. 449519

VOLVO 245 DIESEL
árg. 87 til sølu. Nýsýnaður, í góðum standi, prísuppskot 22.000,-
Tlf. 421535 ella 267116

TÍN BILUR
Daewoo Legansa er sum nýggjur og hevur leðursetur, 17" og 15" sportfelgur og gott anlegg við cd box og allari útgerð sum ein Daewoo kann hava, koyrt 50.000 km, til sølu um hóskandi boð fæst. Kann síggjast á www.bil.fo
Tlf. 222026

TOYOTA AVENSIS 2.0 TD
St. car, árg.99 til sølu.
Tlf. 374555/226565

VW GOLF V6
2800, 204 HK, 3 ár, hevur koyrt 49.600 km, Áhugað kunnu ringja á
tlf. 210301

YNSKIST
Brúktur bilur ynskist til keyps.
Tlf. 226565/374555

DAIHATSU CHARADE TS
1.0 bensin, árg. 79, koyrt 199.000 km, motorurin hevur koyrt uml. 140.000 km, sýnaður 24.02.03, koyrir væl, til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 508064 eftir kl. 14.30

NISSAN SUNNY 1.6
árg. 93 við aut. gearum í sera góðum standi til sølu.
Tlf. 423073

TOYOTA DYNA 150
lastbilur við trælast, árg. 90 biliga til sølu.
Tlf. 333488

VW GOLF TD
árg. 91 til sølu.
Tlf. 441258

FELGUR
4 14" felgur til Toyota HiAce til sølu.
Tlf. 227922

EYKALUTIR
til Toyota HiAce diesel, árg. 88 til sølu.
Tlf. 227922

VOLVO 940
árg. 96 til sølu.
Tlf. 447942

CITROEN BERLINGO 2.0 HDI SX
til sølu, eldreyður metallakk, velourinntrekk, sleipikrók, cd/radio, eyka setur aftan o.a. koyrt 32.000 km, árg. nov.2001. Í góðum standi. Prísuppskot kr. 150.000. Ring og hoyr nærri á
tlf. 333450 ella 222067

VW GOLF GTI
til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 456231 ella 503631

7 STÁLFELGUR
14" og 3 píkadekk til sølu. Felgurnar hava 5x100 ímillum holini og dekkini 175/70x14. Biliga til sølu.
Tlf. 224056

4 PÍKADEKK Á FELGUM
Dekkini eru 155/80x13 og felgurnar hava 4x100 ímillum holini. Biliga til sølu.
Tlf. 224056

NISSAN PRIMERA 2.0 SLX
Top Line til sølu, árg. 95, hevur elrúr, servostýring, centrallás og setur varma framman.
Ring á tlf. 575445 eftir kl. 18

PEUGEOT 406
1.9 TD til sølu fyri 105.000,- Ring og hoyr nærri.
Tlf. 224984

NISSAN LASTBILUR
Ein Nissan diesel lastbilur til sølu, árg. 89 er í góðum standi, var til sýn 5.2.2003 ongan kross. Hevur goð dekk undir, hevur koyrt 155.000 km
Tlf. 252897

BRÚKTUR BILUR
Ein Toyota Carina E 2.0 GLi til sølu.
Tlf. 254040

VOLVO 850 GLT 2.5L 170 HP
Brúnt leður innan, sentrallás, elrútar, elspegl við hita, viðgjørdur ímóti rusti, sýnaður 12/2002, árg. 1994, km 121.000, í sera góðum standi, selist um hóskandi boð fæst.
Tlf. 213646

MERCEDES
Mercedes 190 Diesel, árg. ´89 til sølu.
Tlf. 443216 ella 743216

FORD MONDEO TIL SØLU
1,8l, aut. árg. 1994, koyrt 80.000 km. Bilurin er í góðum standi. Sýnaður í januar í ár og kammreimin er skift fyri stuttum. Spildurnýggj summardekk á alufelgum eru undir bilinum, og vetrardekk á felgum kunnu fylgja við.
Tlf. 319325

RENAULT 1.9
Silvurgráur Renault 1.9, árg 11/94. Biliga til sølu.
Ring 210408 ella 522832

TOYOTA LAND CRUISER
sýnaður 2003. Koyrir gott, hevur fýra spildurnýggj dekk undir. Hóskandi boð fæst. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 226880

MITSUBISHI GALANT
árg. 85 1.8 TD. Turbinan er defekt. Biliga til sølu. Er góður til eykalutir.
Tlf. 441510

VOLVO 440 GL
árg. 90, koyrt 91.000 km, nýsýnaður, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 211735

STÓRT BILANLEGG
JBL subwoofari 1000 watt, fleiri hátalarar, 2 forsterkarar selist um hóskandi boð fæst.
Tlf. 221891/423447

RENAULT CLIO TIL SØLU
árg. 91, powerstýring, koyrt 99.300 km, radio v/flogusspælara, 4 píkadekk og 4 vanlig dekk fylgja við.
Tlf. 447007/213007

TIL SØLU
Toyota Hiace 2.4 sýnaður 8/03. Alufelgur 14" til Nissan fyri kr. 1000.
Rlng 506336 ella 257140

TOYOTA COROLLA EE90
hvítur, 2 hurðar, árg. 90 til sølu.
Tlf. 447753/261185

TOYOTA CAMRY 2.2
árg. okt. 2000, biliga til sølu. Bilurin hevur 17" felgur, stereoanlegg og píkadekk á felgum.
Tlf. 263330/210038

FORD MONDEO
árg. 95 til sølu sum eykalutir (er dømdur vrak) til hægstbjóðandi.
Tlf. 281757

FORD SIERRA PLAZA 1.6
sýnaður jan. 03, koyrt 110.000 km, árg.89, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 508783

17" SPORTFELGUR
av slagnum Alessio Rally Hava 4 hol og passa m.a. til Primera P10. Í hampuligum standi, til sølu fyri 4.000,- við dekkum.
Tlf. 251235

PÍKADEKK
Fýra lítið brúkt píkadekk á felgum til Opel Astra, 4 hol, til sølu fyri 1.500,- kr.
Tlf. 448764

FORD FIESTA
árg. 91 er nýsýnaður til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 229887

HONDA CIVIC 1.5i VTEC
árg. 06.96, el spegl, rútar og sóltak, 15" sportfelgur og nýggj píkadekk á sportfelgum fylgja við.
Ring 222888

TOYOTA CARINA II 1.6
árg. 87 til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 250133

VW GOLF 1.6 TD
árg. 84 til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 250133

TIL SØLU
Silvurgráur Toyota Avensis, vøruvognur 2.0 TD, koyrt 73.000 km. Pikadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 320220-225167

Amboð

TRAKTORUR TIL SØLU
- Deutz DX90 traktorur. Vognur v/last og vippigreiðum. Vognur v/hydr. netatrumlu. Selist samla ella hvør sær. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 212753 ella 332753

SNIKKARAMASKINUR TIL SØLU
Khelimaskina: Weinig U. 17 A. 1980, spindlav 6. Tappmaskina: Vertongen P.O.H. 1979. Rundsag: Altendorf 5.5 KW, 1984, 400 mm. Slípimaskina: Drifo F25, til profiljørn/rundsagir. Jørn til vindeygu, hurðar og listar.
Tlf. 212705

YNSKIST
Ein luftkompressari uppá eini 3-4 HK ynskist biliga til keyps. Skal vera í góðum standi.
Tlf. 312146 eftir kl. 18

SNIKKARABONKUR
Snikkarabonkur, lítið brúktur til sølu. Breidd: 58 cm. Full breidd: 88 cm. Spenniið: 210 cm. Prísuppskot: 8.000,00 krónur.
Telefon: 310039 eftir kl: 18:00

DREYGIBONKUR
stórur, gamal maskindreygibonkur til sølu.
Tlf. 332824

Arbeiði

TØRVAR TÆR
bókhalds- ella roknskaparhjálp? Í longri ella styttri tíðarskeið, so er hetta nakað fyri teg. Havi royndir innan bókhald og grannskoðan. Hevur hetta tín áhuga, so ring
217282 og hoyr nærri

TRYKKSPULING
Vit trykkspula garðar, grundir, tún og kjallarar. Og sjálvandi hava vit eisini avfuktara at turka rúmini við eftir at spulað hevur verið.
Ring 509079 ella 252017 og hoyr nærri

ROYNDUR
dumpara- og treylarasjauførur søkir arbeiði. Yvirtíð ongin forðing.
Tlf. 224417

ALT BYGGIARBEIÐI
verður gjørt skjótt og væl. Húsasmiðurin Spf. v/ Erik Møller. Koma um alt landið.
Tlf. 361977/220387

Barnaansing

SØKT VERÐUR
eftir barnagóðari gentu, at ansa 3 børnum í aldrinum 1 1/2 - 10 ár eftir tørvi.
Tlf. 322200/270360

GENTA/KVINNA
søkist at ansa Høgna (5 1/2 mánað nú) 9-15.30 frá uml. 1/2 oktober.
Tel. 320636

GENTA/KONA SØKIST
at ansa 8 mðr. gomlu Biritu frá 8-16 mánad.-friggjad.
Ring 312077/229454

EG ERI EIN
sera fitt genta á 17 mðr., sum fegin vil hava eina damu/gentu í Havn til at ansa eftir mær frá kl. 9.30 til 17.00 meðan mamma og babba eru til arbeiðis.
Vinarliga ring 321441 ella 211445

Barnaútgerð

RIMASONG TIL SØLU
Rimasong, hvít og ljósareyð. kr. 200,-
Ring 213492

TIL SØLU
Bilstólur, 9-36 kg. 250,-
tel. 320828

TIL SØLU
Bláur Brio tvillingavognur við lúftum og voksiposum, regnslag, flugunet. Kann gerast til koyristól. Alt í góðum standi.
Tlf. 320266/507601

LÍTIÐ BRÚKTUR
myrkt grønn kombivognur (Simo) við lúft, madrassu, fluguneti og regnslagi til sølu.
Tlf. 441804/211804

TVILLINGSVOGNUR
Myrkabláur tvillingavognur, sera lítið brúktur, til sølu fyri 3.500 kr. Silvercross svartur 900 kr.
Tlf. 451015 ella 261528 e. kl. 17

TVÍBURAVOGNUR
Ein myrkabláur combi tviburavognur við lyftum til sølu fyri 2.500 kr. Regnslag fylgir við.
Tlf. 448554 ella 266338

Bátaútgerð

JOLLA YNSKIST
til keyps, uml. 10 fót.
Tlf. 215140

TIL SØLU
4-mannafar til sølu, uttan motor. Niclas í Koltri hevur bygt.
Tlf. 374555/226565

VATNSKUTARI TIL SØLU
Yamaha Waverunner XLT 1200, 155 HK, árg. 2001.
Ring 215968

BÁTAR TIL SØLU
Ein Sómi 800 uttan fiskiloyvi, árg. 89, motor VP 230 v. drevi árg. 2002, alla nautiska útgerð, oljufýring og 4 DNG snellur. Ein Víkingur 800 við fiskiloyvi árg. 95, motor VP 230 við drevi, árg. 2000, alla nautiska útgerð og 4 DNG 6000i snellur. Eitt sera snotuligt seksmannafar úr Kaldbak árg, 84 til sølu, bátarin hevur ikki fiskiloyvi.
Tlf. 228741, www.batur.fo

TIL SØLU
4 vátdraktir, vatnski, sleipipúta og endar til sølu fyri 10.000 kr. Nýprísur er ca. 15.000,- fyri alt. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 226880

STÓRT 10-MANNAFAR
við 65 HK motori og við fiskiloyvi til sølu. Sæst á www.torgið.com.
Tlf. 567890

GÓÐUR MOTORUR
200-300 HK, helst Volvo ella Yanmar, ynskist til keyps.
Tlf. 215738

Bingo

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba leygarkvøldið 6. sept. kl. 20.00.
Nevndin

BINGO VERÐUR
í Felagslonini í Fuglafirði leygarkvøldið 6. september kl. 19.00. Lamb í heyst á lutaseðli.
Eldrafelagið Borgin

SEYÐABINGO
Stórt Bárubingo verður í Skálanum mánakvøldið 8. sept. kl. 19.30. At vinna verða ein veðrur og 9 lomb. Vinningurin til fulla plátur: Nátungar. Hópin av góðum vinningum. Gjaldast kann við FR-Visa kortið.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

DRIVE - IN BINGO
verður á Flúgvarabedingini sunnudagin 7. september, klokkan 16.00. Nógvir góðir vinningar t.d. tvær flogferðir fyri 2.
FSV-Stuðlar

HEY SUÐUROYINGAR
Tvøroyrar Svimjifelag hevur bingo 8. september og 6. oktober og Ljómur hevur bingo 29. september.

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 6. sept. kl. 15. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli 2 x 500 kr. og ein vikuskiftisflogferð til DK. Bingola, eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 4. september kl. 19. Full pláta 400 kr. gávukort, tó 6. og 12. spæl full pláta 600 kr. gávukort. Á lutaseðli millum annað 1 x 500 kr. gávukort og 1 x 1000 kr. gávukort. Eyka spæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-Stuðlar

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 8. september kl. 19.00 12 plátur 100 kr. Drigið verður ímillum spelini. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frimerki

Bøkur

BRÚKTAR BØKUR
til studentaskúla til sølu.
Ring 502056

BØKUR
til student til sølu.
Tlf. 261923

BØKUR YNSKJAST
Er tað nakar, ið hevur Dansktbøkurnar »Litteraturens veje« og »Dansk læsebog« ella »Introduktion til psykologi« at selja mær biliga, vinarliga ring
314441/261506

Burturm. /funnið

HEVUR NAKAR FUNNIÐ
mína Nokia 30.-31. aug. Havi mista hana á Strekkinum, Sundsvegnum, Oman í Stoffalág. Hevur myrkablátt cover. Vinarliga ring
311472/511472

NOKIA FARTELEFON
funnin í J. C. Svabosgøtu, tætt við brúnna um Rættará. Eigarin fær hana, við at kenna Pin-kotuna. Funnin 31. august.
Tlf. 314130

FRENSUR LEINGIST HEIM
Fittur, spakur, stríputur frensur (ungur) gongur í Mattalág, hann er svangur, hvør eigur hann!
Tlf. 316651

HÁLSSMYKKA FUNNIN
í Consul sól í miðbýnum tann 24. august. Eigarin biðist ringja
tlf. 258626

ENDUR-EFTIRLÝSING
Giftiringur funnin í Badmintonhøllini graverað »Tín Mariann 7.4.1985«
Ring 215353

NOKIA 3410
Vikuskifti áðrenn ólavsøku gav eg av óvart Suna frá Runavík mína mobil. Hon hevur svart hylstur. Vinarliga ring
Tlf. 217136

Býli

ÍBÚÐ SØKIST
Friðarligur maður í føstum starvi søkir íbúð í Havn ella nærhendis. Fari væl um, royki ikki og gjaldi til tíðina.
Tlf. 214958

HEY ALLIR HAVNABÚGVAR!
Er tað nakar, ið eigur eina fitta íbúð at leiga okkum? Vit eru eitt par mitt í 20-unum, vit roykja ikki.
Tlf. 251514/224444

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
Ung, friðarlig genta ynskir lítla íbúð, helst í vesturbýnum. Fari væl um og hvorki royki ella drekki.
Vinarliga ring 217484

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
skjótast gjørligt til 22 ára gamla gentu.
Tlf. 260422

KAMAR TIL LEIGU
Undir Brúnni í Tórshavn. Atgongd til kok, bað, vaskimaskin og turkitrumlu. BFU-Bústovnur Føroyinga í útbúgving, Box 1225.
Tlf. 313964/513964

FUGLAFJØRÐUR
Eg leiti eftir íbúð ella húsi at leiga í Fuglafirði.
Tlf. 214003, Eivin

YNSKIST
Andeilsíbúð ca. 45-50 fermetrar í Keypmannahavn ella nærhendis ynskist til keyps.
Tlf. 225313/258323

LÍTIL ÍBÚÐ ELLA KAMAR YNSKIST
Maður ynskir eina lítla íbúð ella stórt kamar í Havn. Fari væl um og gjaldi rættstundis.
Tlf. 257591

YNSKIST
31 ára gamal maður í Havn søkir kamar ella lítla íbúð í Havn beinanvegin. Havi fast arbeiði og gjaldi til tíðina.
Ring 521591 eftir kl. 19

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – moguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 935
Stað: Tórshavn, Berjabrekka
Slag av veiðu: Íbúð
Stødd: Alt hevur áhuga
Kostnaður: Mesti kostnaður 800.000,- kr.

Nr. 936
Stað: Eysturoy/Vágar
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Alt hevur áhuga
Ynski: Gjarna við útsýni
Kostnaður: Uml. kr. 350.000,-

Nr. 937
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Min 600 m²
Ynskir: Við útsýni
Kostnaður: Uml. 700.000,- kr.

Nr. 938
Stað: Tvøroyri
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: 700-1000 m²
Ynskir: Við góðum útsýni
Kostnaður: 60.000,- kr.

Nr. 939
Stað: Tvøroyri/Trongisvágur
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Fam. við 3 børnum
Ynski: Við útsýni
Kostnaður: Uml. 800.000,- kr.

Nr. 940
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Min. 55 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.000.000,-

Nr. 941
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Min. 350 m²
Kostnaður: Uml. 300.000,- kr.

Nr. 942
Stað: Alt hevur áhuga
Slag av veiðu: Grundøki/jørð
Stødd: Minst 10.000 m²
Kostnaður: Helst hús á økinum og nakað uttangarðsjørð

Nr. 943
Stað: Tórshavn – Argir
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 120 m² – 140 m²
Ynskir: 3 kømur og kjallara
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.400.000,-

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

HEY!
Er tað nakar, ið hevur eina íbúð í Havn at leiga einum pari? Um so er, vinarliga ring á
503108 ella 315687, Annika

YNSKIST TIL LEIGU Í SUÐUROY
Íbúð ella hús ynskist til leigu í Suðuroy skjótast gjørligt
Tlf. 214631

FRAMLEIGA Í KBH
2 rúms nýístandgjørd møbl. andeilsíbúð á Islandsbrygge til framleigu til fólk sum fara væl um frá uml. 1/2 sept. til 1/11 el. 1/12 (møguliga longur). Væl hóskandi til 2 fólk. Íbúðin hevur allar hentleikar, s.s. internet, vaskirúm í uppgongini. Liggur beint við Metro, politiskúlan og bert 10 min. frá Hovedbanagarðinum. - royking í íbúðini. Áhugaði ringi
Tlf. +88387430 el. +60944070

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par við einum barni sum søkja íbúð í Eysturoynni skjótast gjørligt. Roykja og drekka ikki.
Tlf. 504723/447405

UNGUR MAÐUR SØKIR
íbúð í Eysturoynni. Helst í Gøtu ella á Runavíkar leiðini. Prísdømi uml. 2.800 kr.
Ring 262009

ÍBÚÐ YNSKIST
Einligur maður søkir íbúð í Havn, Argjum ella Hoyvík.
Tlf. 519808

ÍBÚÐ SØKIST
Ung mamma við 5 ára gamlari dóttur søkir íbúð í Tórshavnar kommunu frá uml. 1. des. Vit fara sera væl um og gjalda til tíðina. Havi fast starv.
Tlf. 228811 og 344604(arb) Sólvá

STÓR HÚS Í HOYVÍK
til leigu tíðarskeiðið 1. okt. 2003 til 1. apríl 2004. Sera barnavinarligt umhvørvi.
Ring 214619/322167

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
Frá 15. september er ein góð, nýggj íbúð á uml. 65 fermetrar til leigu mitt í býnum. Í íbúðini er gongd, stova, kokur, pultikamar, baðiverilsi og 2 kømur. Leigan er 6.000 kr. um mánaðin við hita + 2 mðr. depositum. Í íbúðini er roykiforboð. Hevur hetta tykkara áhuga, vinarliga skrivi til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1658

ÍBÚÐ YNSKIST
28 ára gamal maður søkir íbúð í Havn fyri max. 4.000 kr. við ljós og hita. Havi fast arbeiði.
Tlf. 313428

ER TAÐ NAKAR
ið kann hjálpa okkum at fáa eina íbúð, minst 2 kømur. Vit eru eini hjún við tveimum børnum, vit fara væl um og gjalda til tíðina. Roykja og drekka ikki. Max 5.000,- uttan ljós og varma.
Tlf. 318024 eftir kl. 16

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn. Eri 26 ár, royki ikki, eri friðarligur og havi fast arbeiði. Gjaldi til tíðina.
Tlf. 210727

STÓRT KAMAR YNSKIST Í HAVN
Eri friðarlig, royki ikki, havi fast arbeiði og gjaldi til tíðina. Vinarliga ring
Tlf. 361452

Dýr

KETTLINGUR HORVIN
Hálvvaksin kettlingur, trilittur - svartur, reyður og hvítur - horvin í Hellutúni í eysturbýnum í Havn (við Dj. í Geilsgøtu) mánakvøldið. Ring 21 78 17 um tú hevur sæð hann.
Ebba og Dánjal

DVØRGAHAMSTRARAR
2 sera fittir dvørghamstraraungar vera latnir djóravini.
Tlf. 444684

BORDER COLLIE
7 mánaðar gomul tík til sølu.
Tlf. 333318

HESTUR TIL SØLU
3 ára gamal hestur til sølu.
Tlf. 220978

EIGUR NAKAR
eina brúna kanin (hon) at lata mær.
Ring 507537 ella 448810, Greta

PUDDILHVØLPUR YNSKIST
Silkipuddil hvølpur ynskist.
Tlf. 423071 ella 256571

INNANDURA KANINUNGAR
5 kaninungar til sølu fyri 150 kr. stk. Mamman er dværg vædder og pápin angora. Um tú hevur áhuga, so ring á
tlf. 423544/508010, Elsa

KETTLINGUR
Ein uml. 8 vikur gamal kettlingur, verður latin djóravini. Dugur sjálvur at eta og leppa, eisini er hann reinligur. Vanur við børn.
Tlf. 448777

KETTLINGAR
Tríggir fittir kettlingar, 2 svartir lodnir, 1 grárputur, alt kettur, verða latnir djóravinum.
Tlf. 310231

HAMSTRARAUNGAR
verða latnir djóravinum við at avheinta teir.
Tlf. 310659 ella 508193

HEY!
Tríggir fittir (hann) marsvínaungar til sølu fyri bert 80 kr. stk. Men bert til djóravinir.
Ring á tlf. 316205/258826

KETTLINGUR
undan angora kettu, sera spakur og alskin, matligur og reinligur, hevur uppibiðið at latast djóravini.
Ringið tel. 319051

TOMMY, EIN FRENSUR…
Sær út sum kettan á blikkinum frá Pussi, tvs. svartur við hvítum tríni. Burturblivin 17. 8. á Ovarugøtu í Hoyvík. Veit onkur at siga okkum um hann, vinarliga ring til
319856

HEY TIT
Er tað nakar, sum hevur kaninungar at lata ella selja mær? so kunnu tit ringja á tlf. 252571, skal helst vera hon.
Tlf. 252571

Fundir

DANSIFELAGIÐ Á LÁTRINUM
Aðalfundur verður 16.9.03. kl. 20.00. Skrá samb. lógum felagsins.
Nevndin

Húsarhaldstól

SINGER SEYMIMASKINA
er nøkur ár, lítið brúkt, vælhildin, sum nýggj, verður seld til hægstbjóðandi.
Ring 215353

KOMFÝRUR
ikki av vakrasta slag, men riggar. Til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 521617 - 216617

VASKIMASKINA TIL SØLU
Vaskimaskina av merkinum Candy til sølu fyri 1.000 kr.
Ring 516402

FRYSTIBOKS YNSKIST
Lítil frystiboks ynskist til keyps.
Tlf. 319955/214555

Innbúgv

TIL SØLU
Myrkir møblar antikviðgjørt seeshamtræ.
Sofaborð 90 x 135 (nýprísur 2.695) nú kr. 1.000,-
Borð 60 x 60 (nýprísur 1800,-) kr. 600,-
1 skenkur 160 x 52 x 89 (nýprísur 5.900,-) kr. 2.900,-
2 krakkar 46 cm. høgir kr. 200,- pr. stk.
2 krakkar 39 cm. høgir 150,- pr. stk.
2 krakkar 31 cm. høgir kr. 100,- pr. stk.
1 medisinskáp (nýprísur 1200,-) kr. 600,-.
Alt í sera góðum standi.
Tlf. 318819 ella 262917

TIL SØLU
1 marmor sofaborð við undirstelli úr ljósum rattan kr. 500,-
3+2+1 sofasett úr ljósari reinari ull (nýprísur 12.000) kr. 4.000,-.
1 trækommoda við 5 skuffum kr. 400,-
Ella alt samlað fyri kr. 4.400,-
Samsung stereoanlegg (nýprísur 3.000,-) nú kr. 1500,- Alt í góðum standi.
Tlf. 318819 ella 262917

TIL SØLU
Hvitt skáp til sølu b. 60, l. 140, h. 200 fyri 700 kr.
Song við skreiðibana til sølu. br. 70 cm. longd 200 cm. fyri 700 kr.
Tlf. 421535 ella 267116

GÓLVLAMPA
160 cm. høg, útskorin úr indiskum træi, við skermi til sølu.
Tlf. 314204

SJÓNVARPSBORÐ TIL SØLU
Glas sjónvarps-/videoborð, 83 cm. b. og 41,5 cm. h. Er ongantið brúkt (feilkeyp), til sølu fyri kr. 500,-.
Nýprísur kr. 1.099,-
Tlf. 311975 eftir kl. 17

SPÍSIBORÐ TIL SØLU
4 mðr. gamalt Belair spísiborð 150 x 100 + 2 plátur, kirsuberlitað. Nýprísur 3.000 kr. nú 2.000 kr.
Tlf. 313094/513094

TIL SØLU
Sofa í furu at sláa út, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 333399

SPÍSIBORÐ
við fýra stólum + 2 eykaplátur til at forlongja borðið við fylgja við. Nýprísur uml. 2500 kr. til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 744741

BORÐ TIL SØLU
Borð 119x79 v/ plátu sum er 39x79. I alt 158x79cm. + 4 stólar. Lítið brukt. Til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 226890

TIL SØLU
antik komoda frá 1890 til sølu.
antikkomoda@hotmail.com

TIL SØLU
Ein sofa, 2 stólar og eitt sofaborð 1.000 kr.
Tlf. 224417

ETAGUSONG TIL SØLU
70 x 190 við skuffum undir. Kunnu eisini brúkast sum einkult sengur 600,- kr.
Tlf. 317602/282602

YMIST TIL SØLU
2 stk. trappuportur, ein lítil keypmansdiskur, 6 stk. kokksstólar úr teak. Kom og gev eitt boð. Kann keypast hvør sær.
Tlf. 215353

GRØN WC-KUMMA
Er tað nakað fyri teg, so ring og gev eitt boð.
Tlf. 521617 - 216617

VØKUR GENTUSONG
Vøkur gentu song, 90 cm breið, við botni, skúmmadrassu og seingjaborði. kr. 750,-
Ring 213492

DUPULTSONG
Dubultsong, ljós fura, 170 cm breið, v/ springmadrassum og seingjaborðum. kr. 2.000,-
Ring 213492

TIL SØLU
Sofasett, blátt stoff, 3+1+1 plus borð í ljóst træ, 2.000 kr.
Tlf. 215570 ella 522070

TIL SØLU
Svørt sovisofa til ungdómin 2.500 kr.
Tlf. 215570 ella 522070

TIL SØLU
1 glas handilsdiskur og lítið borð til pengakassan bíliga til sølu.
Tlf. 312385

LEÐURSOFA TIL SØLU
Svørt 3 pers. leðursofa, lítið brúkt, til sølu fyri kr. 6.500,-
Tlf. 310871/226416

ANTIKSONG
Vøkur útskorin avsýrað antik dupultsong til sølu fyri 6.000,- og gráblá antik sofa + 2 stólar og brúnt beisað sofaborð til sølu fyri kr. 7.000,-
Tlf. 322046/522046 eftir kl. 18

SOFA
einki brúkt, br. 1.40 m. full longd 2 m. Myrkablá og støvut blá. Nýprísur 2.100 nú 1.000 kr.
Tlf. 211962 ella 265862

TIL SØLU
Reol system úr bókatræi, stødd uml. 2 m. breitt, og furu hornasofa stødd 2,15 x 2,15 grønt betrekk, biliga til sølu.
Tlf. 313454 eftir kl. 17

LEÐURSOFUR
Smartar 1 ára gamlar 3+2 leðursofur, til sølu fyri 8.000 kr. vegna flyting. Áhugað kunnu ringja
tlf. 210976

TIL SØLU
Snøgg gomul ottoman biliga til sølu.
Tlf. 312273

BOXSONG
90 x 200 cm v/ høvdagalvi og toppmadrassu, lítið brúkt, biliga til sølu.
Tlf. 313569 e. kl. 12

TIL SØLU
Ein ungdómssofa við pútum til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 318428